## Eg meini tað



Arnfinnur Thomassen, studentaskúlalærari

# Hví fór jeg ikki tá íð tarvurin fór

Ein gamal vinmaður, Karl Nolsøe, sáli, segði einaferð eina søgu um gentu í Vági, sum skuldi norður eftir at giftast. Vágbingar mannaðu bát at fara norður eftir við einum tarvi. Men veðrið var so ringt, at gentan hættaði sær ikki at fara við.

Fleiri mánaðir seinri vóru líkindi - men tá var norðanmaðurin longu giftur! Gentan fór av vitinum og gekk og læt: „Hví fór jeg ikki, tá íð tarvurin fór“ til sín doyggjandi dag!

Sama søga rennur mær í hug, nú „undirmálastýrini“ í Havn eru ósamd um, hvør hevur ábyrgdina av seinasta føroyska tarvinum. Gríma hevur kanska brúk fyri hesum AMATØRUM!

Á flatlondum flentu okur at „tarvinum hjá barninum“!

Tað eitur á donskum „barnets tarv“!

Men hvussu við tarvinum hjá suðuroyingum?

Hvørja einastu ferð, at ein nýggjur fulltrúi verður settur í Havn, er hetta einki annað enn sosialhjálp til Miðstaðarøkið!

Skattaprosentið lækkar, húsaprísurin fer á flog - og hesin vælsignaði búskapur kemur upp á kók! (Sum ikki einaferð!)

Men tað man vera sum, tá ið kellingin pissaði í sokkarnar!

Stokkutur varmi!

Støðugt fleiri suðuroyingar eru farnir at halda, at okur høvdu klárað okkum nógv betur uttan Norðanfjørðsveldið!

Ein fólkaatkvøða kundi givið okkum rættin til ríkidømið á sunnanfjørðsleiðum! ST-samtyktin - um rættin hjá fólki til sjálvi at avgera lagnu sína - er væl eisini galdandi fyri oyggjar?

Hví ger Útvarpið ikki eina kanning av, hvat suðuroyingar halda um skilið!? Eina meiningakanning? Tað átti at verið rúm ímillum „reyðkál og bíligar WC-rullur í Runavík“!!!

Men støðan í Tjetjnia og í Eysturríki hevur størri týdning enn støðan í Suðuroy!

Suðuroyar Sjúkrahús liggur í skeljasori - takkað verið Helenu, sum skuldi hava sín vilja! Hon varð bangað uppá pláss í Klaksvík og í Havn! Men í Suðuroy - har hon og sjarmørurin hava nakrar fáar atkvøður - har fekk hon sín vilja!

Vágbingar vistu hvønn veg tað bar, tá ið postverksstjórin var settur! Okur kenna mannin aftur, sum á sinni var sendur suður á flakavirkið í Vági at koyra fólk til hús!

Landstýrismaðurin hevur eisini hótt við - um Verkið ikki verður privatiserað - at geva stjóranum „neyðugu boðini“!

Skjótt verður hornið á bláum botni farið í søguna!

Føroyski tarvurin er um at doyggja út!

Skal Suðuroyggin fara sama veg, sum tarvurin!? So SMS-Varpið kann spæla skotska seyðasangin: „Hello, Dolly“?

Og landbúnaðarálitið aftur skal verða: „Molly“ (Langa Lív?)

Og nýføroyski tarvasangurin av Royndarstøðini: „Hello, Bully“?

Og Carlsbergbjórið, sum bjarga skal gamla býlinginum í Koltri?

Gakk og stikk av! - Hví fór jeg ikki, tá ið tarvurin fór!?



FØROYA SOSIAL-DEMOKRATUR

FRÆLSI JAVNAÐUR BROÐURSKAPUR

Nr. 37. | Lýsingaprísur fyri mm: 12 oyru á 1. síðu, 10 oyru á 3. og 4. síðu | Leygardagin 15. september 1945. | Blaðið verður bílagt á posthúsinum, og kostar kr. 2,00 + porto um fjórðingsárið | 19. árg.

„KAOS“

Henda seinasta tíðin her í Føroyum hevur verið politisk ein framúr tíð, ein uppøsandi tíð, beinanvegin sagt: ein óð tíð, sum hevur sett síni ódámligu merki á fjøldina av okkara fólki. Okkara politisku oddamenn hava gingið undan við ófriði og klendri og ávirkað fólkið soleiðis, at tað er verðið støðuleyst og hevur mist sakligt og róligt yvirlit. Ein gølan er farin fyri og onnur eftir um landið. Málvíst arbeiði, ið serliga hesa ófriðatíð hevur verið harðliga fyri neyðini, er kódnað í ábyrgdarleysum og tómum atfinningum og einari agitatión, ið ikki firnast at nýta øll miðul og ganga øll stig fyri at vinna síni mál.

teimum upp í hendi, fór til húsa heim og læt okkara gamla Ting, sum vit hóast alla misskiljing og alt klandur, hava kent okkum heldur enn ikki erpin av, sita eftir við hálvari manning. Og ringast av øllum má tykjast, at tað var Tingsins kosni formaður, ið fór við monnum sínum. Formaðurin á bátinum, ið slepti róðrinum og bað allar leggja árar inn og bara lata reka.

Tað er sagt, og tað skal verða upp aftur tikið her, at slík hending er ókend í parlamentariskari søgu. Vit kundu hugsa okkum, hvussu ljóðað hevði, um størsti flokkur í enska Parlamentinum flýddi úr tingstovuni og kom ikki aftur. Hetta var so fyrsta ferð, eitt »isolerað tilfelli«, og menn

flokkur kravdi og lat tessvegna adressu ganga runt at fáa valg. Tað sitandi fólkið hevði ikki fólksins vilja, varð borið fram. Og har var agiterað og har var leikað í bæði munnliga og skrivliga, og so fingu menn sín vilja. Valg varð hildið, og Fólkaflokkurin vann nógvar sessir á tingi — ikki bara uppá nationalar spurningar, minnist til tað, har var so nógv blandað uppí, sum einki hevði við tað tjóðskaparliga at gera. Men aftur nú sigur hesin flokkur, at hetta sitandi Tingið sýnir ikki fólksins nationala vilja, hesir menn, sum nettupp vóru valdir við stjórnarskipan sum stevnuskrá, kunnu ikki fara av landi at samráðast við Danir. Vit skulu hava nýtt valg, og tá skal einki havast á lofti uttan bara tann tjóðskaparligi og

FYRI SKIPABYGGINGINA

*Ósannindini ganga aftur hjá fólkaflokkinum, tí teir eiga einki veruliga virðismikið at flyta fram frá flokkinum og hansara starvi á tingi.*

Sum menn minnast, skrivaði Richard Long ógvuliga øðisliga, at javnaðarmenn ikki høvdu viljað stýðjað eitt so sera gott uppskot frá fólkaflokksmonnum á tingi viðvíkjandi endurnýggjan av okkara skipaflota.

Vit prógvaðu tá gjølla, at R. L. talaði fullkomuliga sum óvitingur fyri ikki at siga ósannindisberari. Fólkaflokkurin hevði als ikki sett fram nakað seruppskot í skipamálinum. Hann hevði verið við hinum flokkunum at seta fram nøkur fá lítisverd punktir, **ið øll vórðu samtykt**. Men tað var alt.

# Rýmdu eisini í 1945

**ÚR TINGINUM.** Tað vakti ans, tá andstøðuflokkarnir á tingi herfyri rýmdu úr tingsalinum aðalorðaskifti var um Caragata - álitið. Líknandi hending fór eisini fram í 1945

*John Johannessen*

Áðrenn døgurða 16. februar í ár hendi tann løgna hending, at andstøðan rýmdi úr tingsalinum. Andstøðan rýmdi, tí hon metti ikki, at grundarlag var at halda eitt aðalorðaskifti um frágreiðing frá landsstýrismanninum í vinnumálum um gagnligastu fíggjar- og lógarkarmar til at fremja búskaparvøkstur og økja íløgurnar í Føroyum — tað sonevnda Caragata álitið.

Andstøðan hevði nevniliga ta sannføring, at tá eitt mál kemur frá landsstýrinum í tingið til aðalorðaskiftis, so er tað politikkur samgongunnar, ið er til aðalorðaskiftis. Men framsøgurøða Tjóðveldisfloksins bendi á alt annað, enn semju í samgonguni.

**Klandur um krónuna**

Hósdagin 23. august 1945 klokkan ellivu fyrrapartin hendi líknandi hending. Tá rýmdi størsti flokkurin á tingi, Fólkaflokkurin, úr tingsalinum við øllum sínum tinglimum.

Hetta hendi tá løgtingsformaðurin, Thorstein Petersen, hevði lisið upp eitt bræv, ið allir tinglimir Fólkafloksins høvdu skrivað undir. Í hesum brævi søgdu tingmenn Fólkafloksins, at sjálvt um danski staturin kom at hava ávísar útreiðslur av, at rokna føroysku krónuna við upp í danskan krónukurs í Stórabretlandi, so kom hetta seinni at geva dønum inntøkur.

Málið, ið var á dagsskránni, var nevniliga, um føroyingar skuldu hava felags gjaldoyra og felags kurs við danir.

Brævið gav boð um, at eingin avgerð skuldi takast í gjaldoyraspurninginum fyrr enn málið um málið um, hvør ráddi í oyggjunum var avgreitt.

Dimmalætting frá 25. august veit at siga, at Thorstein Petersen avgjørdur las víðari, at Fólkaflokkurin ikki vildi luttaka í nøkrum samráðingum, men, at hann heldur ikki vildi tveita frá sær sín avgerðarrætt.

Tá Thorstein Petersen var liðugur at lesa, gav hann boð um, at nú fór Fólkaflokkurin úr tingsalinum. Og so fór sjálvur formaðurin á tí høga tingi, Thorstein Petersen, avgjørdur út úr tingsalinum. Eftir honum fygdu allir hinir ellivu tinglimir Fólkafloksins.

**Fundurin helt fram**

Tingsalurin var nú heldur tómligur. Eftir stótu bert teir átta tinglimir Sambandsfloksins og teir fimm tinglimir Javnaðarfloksins.

Tingið kundi tó kortini halda fram. Tá Fólkaflokkurin var farin út tingsalinum, tók næstformaður tingsins, Kristian Djurhuus úr Sambandsflokkinum formanssessin. Hann harmaðist um, at formaðurin hevði fingið forfall og bað tingið um at sleppa at útseta fundin fyribils.

Klokkan tólv varð tingfundur aftur settur. Sama mál var á dagsskránni, og eftir stuttar framsøgurøður frá Peturi Mohr Dam og Kristiani Djurhuus varð gjørt av at beita málið í nevnd.

**Skapti øsing**

Eins og andstøðan fekk nógvar ákoyringar fyri at hava rýmt frá tingfundinum herfyri, fekk Fólkaflokkurin eisini nógvar ákoyringar fyri at teir rýmdu úr tingsalinum hendan summardagin í 1945.

Ákoyringarnar móti Fólkaflokkinum í 1945 kunnu av røttum sigast at vera heldur grovari enn ákoyringanar í 2000. Javnaðarflokkurin, ið saman við Sambandsflokkinum rýmdi av tingi, tá aðalorðaskifti varð hildið um Caragata áltið, er ógvuliga hvassorðaður í Føroya Sosialdemokrati eftir hendingina.

Undir yvirskriftini »Kaos« skrivar ein, ið kallar seg Flóki, millum annað: »Hvussu verður skilið, um aðrir flokkar í framtíðini fara at gera tað sama, sum Fólkaflokkurin gjørdi í august 1945? Eftir hesum at døma mugu menn hava fullan rætt til at rýma undir tingsetu, tá ið okkurt gongur teimum ímóti. Ella eisini siga seg hava rætt til at krevja Tingið slitið, nýtt val útskrivað upp á vissar spurningar og føra fram, at eitt sitandi Ting hevur ikki fólksins álit, nýtt Ting, nýggir menn skulu veljast.«

Føroya Sosialdemokratur kallar hendingina fyri ein tann størsta kvøkkin, politiskir menn hava givið føroyingum, tá ein heilur flokkur rýmdi av tingi, legi verk sítt frá sær, ið fólkið hevði litið teimum upp í hendi, fór til húsa heim og lat okkara gamla Ting, sum vit hóast alla misskiljing og alt klandur, hava kent okkum erpin av, sita eftir við hálvari manning.

Høvundurin heldur, at ringast av øllum má tykjast, at tað var Tingsins kosni formaður, ið fór við monnum sínum. Formaðurin á bátinum, ið slepti róðrinum og bað allar leggja árar inn og bara lata reka…

**Tíðindablaðið Sosialurin. Postadressa:** Postboks 19, 110 Tórshavn. **Telefon:** 311820. **Telefax:** 314720.
**Email til 2'aran:** eydun@sosialurin.fo. **Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller. **Blaðstjóri:** Eyðun Klakstein.
**Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin.



# Pólfari við Føroya-sambandi

**PÓLFARI.** Um dagarnar frættist, at heimskendi pólfarin, Sir Ranulf Fiennes, hevði verið fyri óhappi á eini ferð til Norðpólin. Fyri sjey árum síðani rak ein onnur søga um Ranulf Fiennes og hansara æevintýrupp á land í urðini heima á Sandi

*Dánjal Højgaard*

56 ár gamli bretin var óheppin, tá ið hann skuldi ganga einsamallur til Norðpólin. Hann fekk frostbit í hendurnar og mátti flytast á sjúkrahús í Kanada.

Kanska ringdi onkur klokka, tá ið tíðindini um Ranulf Fiennes bórust í Útvarpinum. Tí tann royndi bretski ævintýrarin hevur nevniliga eitt løgið samband við Føroya.

**Løgin reki**

Ein illveðursdag fyri sjey árum síðani skolaði bókstaviliga ein onnur søga um Ranulf Fiennes og hansara brøgd upp á land heima á Sandi. Ein kaldan vetrardag tíðiliga í 1993, fann ein heimasandsmaður ein sjáldsaman reka. Ein reka, sum líktist mest einum avlongdum fruktblikki.

Í blikkinum lógu ymisk skjøl, sum søgdu søguna um tann løgna rekan. Talan var um eitt sokallað tíðarhylki, sum nakrir bretskir ævintýrarar høvdu grivið niður í ísin skamt frá Norðpólinum í 1977. Hetta var gjørt til minnis um, at tað vóru liðin 20 ár síðani, at farið varð undir regluliga ferðafólkaflúgving millum Evropa og Fjareystur - tvørtur um Norðpólin.

Flogfelagið SAS hevði latið pólfarunum hylkið. SAS var sponsorur hjá bretska ferðalagnum, hvørs leiðari kallaðist Sir Ranulf Fiennes.

**Í National Geographic**

Stutt eftir hendingina heima á Sandi var Útvarpið í London og hitti tveir av monnunum, sum vóru við á pólferðini í 1977. Bilsnir vóru teir, tá ið teir sóu tíðarhylkið aftur eftir so mong ár.

Útvarpið gjørdi nakrar sendingar um sjáldsama rekan og norðpólsferðina hjá Ranulf Fiennes og hansara monnum í 1977. Eisini heimkenska tíðarritið National Geografic fekk frænir av søguni, og skrivaði eina grein um tann løgna rekan á Sandi.

Norðspólsferðin hjá Sir Ranulf Fiennes í 1977 var ikki serliga væleydnað. Teir komu bert gott og væl hálva leiðina fram. Sjálvur hevur Fiennes kortini gjørt mangar aðrar væleydnaðar ferðir – bæði á Suðurpólinum og Norðpólinum. Einsamallur og saman við øðrum.



Sir Ranulf Fiennes á odda fyri The British North Pole Expedition, sum í 1977 strandaði 150 fjóðringar frá Norðpólinum.





Gomlu pólfararnir Charles Burton (t.v.) og Oliver Shephard vóru bilsnir, tá teir sluppu at síggja tíðarhylkið aftur, sum teir 16 ár frammanundan høvdu grivið niður í ísin við Norðpólin. Ranulf Fiennes var á veg til Suðurpólin tá hendan myndin var tikin

## Raktur av óhappi

Ein roynd at ganga einsamallur til Norðpólin miseydnaðist. Eldur kom í tjaldið og Ranulf Fiennes fekk frostskaða í hendurnar.

56 ára gamli Sir Ranulf Fiennes verður mettur sum heimsins mætasti núlivandi pólfari. Men sjálvt tann mest royndi ævintýrarin má lúta viðhvørt. Eina viku eftir, at hann fór undir tann 1100 kilometrar langa teinin úr Kanda til Norðpólin, mátti hann geva skarvin yvir.

Hann fekk frostskaða í hondina, tá ið hann royndi at bjarga tveimum sleðum, ið vóru farnar niður ígjøgnum ísin. Eftir at hava mist útgerðina og eftir at eldur var komin í tjaldið gekk Fiennes aftur til høvuðsleguna, sum lá12 kilometrar burturi.

Haðani var tann skaddi pólfarin tikin upp og flogin á sjúkrahús í Kanada